VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og sirm ella mjørki av og á, men eisini sólglottar. Hitin millum 14 og 17 stig.



Veðrið leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 13 og 16 stig.



Veðrið sunnudagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 16 og 20 stig.

DAGSINS FERÐAFÓLK

»Renata Ivan, Ísland, Siglufjørður«

Í góðveðrinum hittu vit eitt ferðalið av íslendingum á gongugøtuni í Havn. Tað var eyðsæð, at tey hugnaðu sær óført í sólskininum. Renata Ivan var fús at práta og fortelja okkum sína hugsan um føroyingar og Føroyar

Orð: Rókur Jakobsen
rokur@sosialurin.fo

■ Hví eru tit í Føroyum?
– Vit eru komin hagar við einum manskórið – Karlakór Siglufjörðar. Kórleiðari er Elias Þorvaldsson. Vit eru eini 40 fólk í ferðalagnum. Vit komu hagar í gjár, og vit búgva á Gjáargarði. Har er sera gott at búgva. Í dag eru vit komin til Havnar fyri at síggja høvuðsstaðin og kanska keypa okkurt tinganest.

■ Og hvat dámar tykkum í Føroyum?
– Sum sagt, so komu vit hagar í gjár, men higartil haldi eg, at her er gott at vera. Fólkið er sera vinarligt og hjálpsamt. Náttúran er vøkur, og luftin er heilt ótrúliga frísk. Alt er sera reint her, og tað er virkiliga gott at upplivað. Alt hevur gingið okkum væl higartil, og vit nýta tíðina her.

■ Halda tit at Føroyar og Ísland líkjast?
– Ja, heilt vist. Tað eru nógv viðurskifti sum minna um hvørt annað. Náttúran er rættiliga lík tí íslendsku, hóast alt er eitt sindur minni her. Og veðurlagið tykist eisini verða eins og tað íslendska. Veðrið í dag er heilt ótrúligt, og rokni ikki við at hetta er gerandiskostur í Føroyum. Vit hava higartil verið sera heppin við veðrinum. Men tað er ótrúligt at føroyingar skilja íslendskt. Eg skilji ikki føroyskt, og tí haldi eg at tað er so løgið tá ið føroyingar skilja okkum

■ Nær fer Karlakór Siglufjörðar at framføra?
– Kórið skal á pallin leygardagin kl. 16.30 í Vesturkirkjuni. Sjálvandi vil eg ráa øllum føroyingum at koma á konsert, tí at tað verður heilt vist eitt gott upplivilsi. Vit fara longu til Íslands aftur sunnudagin.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	5
Qaqortoq	8
Ammassalik	8
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	15
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	11
Lerwick	14
Aberdeen	17
London	21
Tromsø	--
Bergen	12
Oslo	--
Stokkhólm	15
Keypmannah.	16
Helsinki	18
Moskva	27
Berlin	20
Warzawa	25
Kiev	27
Bukarest	30
Paris	23
Madrid	31
Róm	32
Malorca	28
Athen	34
Malta	36
Tunis	33
Beijing	25
New Dehli	33
Bangkok	31
Jakarta	31
Sydney	16
New York	30
Miami	31
Los Angeles	22
Meksikobýur	21
Panama	30
La Paz	11
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	13

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 985 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina. Eitt annað lágtrýst, 1015 hPa. vestan fyri Írland kemur hendavegin.



Í dag:
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjakvøldið.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 28/6 kl. 06^{00}– 29/6. 06^{00}. Hitin í gjár: 10,8°
Minsti hiti máldur í juni: -0,3° - Mesti hiti máldur í mai: 20,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 1,4 mm – mált frá 28/6 kl. 06^{00}– 29/6 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juni: 53,2 mm

GEVID BLÓÐ

Fjeppari?
Les um ítrótt í Sosialinum

VESTFALLSKYRRINDI

16. juni	Mánin næstur jørðini
25. juni	Tendring
1. juli	Mánin longst frá jørðini
3. juli	Fyrra kvarter

Kelda: Ársmanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
29. juni	10.31	22.53	09.31	21.53	09.46	22.08	00.10	12.31	01.10	13.31	08.46	21.08	07.46	20.08	10.46	23.08	11.46	-	10.16	22.38	11.31	-
30. juni	11.13	23.33	10.13	22.33	10.28	22.48	00.53	13.13	01.53	14.13	09.28	21.48	08.28	20.48	11.28	23.48	00.08	12.28	10.58	23.18	00.53	12.13
1. juli	11.52	-	10.52	23.11	11.07	23.26	01.33	13.52	02.33	14.52	10.07	22.26	09.07	21.26	-	12.07	00.48	13.07	11.37	23.56	00.33	12.52
2. juli	00.11	12.27	11.27	23.44	11.42	23.59	02.11	14.27	03.11	15.27	10.42	22.59	09.42	21.59	00.26	12.42	01.26	13.42	-	12.12	01.11	13.27

5 707265 100050 >